

# REPROZ SØKIR EFTIR INTERNETRÁÐGEVA, SNIÐGEVA OG SAMSKIPARA

**Reproz er í stórum vøkstri og hevur brúk fyri fólki, ið hevur hug at vera við í framhaldandi menning okkara.**

### SAMSKIPARI/PROJEKTLEIÐARI

Megnar tú at hava nógvar bóltar í luftini í senn? Dugir tú væl við fólki, og heldur tú høvdið kalt, tá ið á stendur og deadline nærkast? So ert tú okkara fólk, tí vit sóknast eftir einum nærløgdum og miðvísum samskipara at leiða størri og smærri verkætlanir.

**STARVIÐ**

Uppgávurnar eru sera fjølbroyttar, og tú fert at samskipa verkætlanir av sera ymsum slagi, eitt nú lýsingaherferðir, heimasíður, framleiðslu av sjónvarpslýsingum, samleikaskifti hjá fyritøkum, prentframleiðslu og mangt annað.

Tú verður partur av ráðgevabólkinum og fert at samstarva við okkara sniðgevar, forritarar og sølufólk.

**FØRLEIKAKRØV**

Tú hevur viðkomandi útbúgving í projektleiðslu, marknaðarføring, samskifti ella tílíkum og/ella hevur hollar royndir í projektleiðslu.

### GRAFISKUR SNIÐGEVI

Leitar tú eftir størri avbjóðingum og vilt sleppa at brúka tíni kreativu evni í einum spennandi arbeiðsumhvørvi? Vilt tú hava ávirkan á samleika og samskifti hjá nøkrum av størstu fyritøkunum í Føroyum? Vilt tú sleppa at arbeiða við spennandi og umfatandi verkætlanum, ið veruliga síggjast aftur og vinna kolur? So ert tú rætti persónurin fyri okkum, tí vit sóknast eftir einum dugnaligum og royndum sniðgeva, sum hevur nógv upp á hjarta.

**STARVIÐ**

Sum grafiskur sniðgevi á Reproz fært tú stórar avbjóðingar og sjálvstøðuga ábyrgd. Tú verður partur av okkara kreativa toymi og fert at samstarva tætt við okkara ráðgevar. Tú fert at arbeiða við sniðgeving og konseptmenning innan prent, livandi lýsingar, heimasíður, flash og annað.

**FØRLEIKAKRØV**

Tú ert útbúgvin sniðgevi ella grafikari og/ella hevur hollar royndir á økinum. Tú brennur fyri samskifti og sniði, ið muna og styrkja samleikan hjá viðskiftafólki okkara. Tú ert ein góður viðspælari og mótspælari hjá starvsfólki og viðskiftafólki og dugir væl at grundgeva fyri tínum hugskotum. Tú hevur ans fyri dygd, arbeiðir strukturerað og miðvíst og hevur rætta yvirlitið, tá ið nógv er at gera.

### INTERNETRÁÐGEVI

Vilt tú sleppa at ráðgeva nøkrum av fremstu fyritøkunum í Føroyum? Vilt tú standa á odda fyri einum øki í stórari menning? Hevur tú førleikarnar og áræðið at gjøgnumføra nýskapandi og umfatandi internetverkætlanir? So hevur Reproz brúk fyri tær, tí vit leita eftir einum dugnaligum, royndum og fyrikomandi ráðgeva/leiðara til internetdeild okkara.

**STARVIÐ**

Tú fert at hava ábyrgd av menning, ráðgeving og verkætlanarleiðslu í tøttum samstarvi við okkara projektleiðarar, sniðgevar og forritarar. Arbeiði títt verður m.a. at ráðgeva um internetsamskifti, snið, funktiónir og sameining við aðrar KT-skipanir. Harumframt koma tilboðsgeving, demonstratión av CMS-skipan, undirvísing og projektsamskipan.

Reproz er Solution Partner hjá Dynamicweb (DK) og umboðar skipanina í Føroyum og Íslandi. Í hesum sambandi kann roknast við ávísari ferðing.

**FØRLEIKAKRØV**

Tú hevur hægri útbúgving í kunningartøkni, multimedia, samskifti, marknaðarføring ella tílíkum. Tú hevur hollar royndir við heimasíðum og internetsamskifti og dugir at arbeiða sjálvstøðugt og áhaldandi við stórum verkætlanum. Tú hevur skil fyri informatiónsarkitekturi og usability, hevur eyga fyri sniði og funktionaliteti og sært heimasíður og intranet sum ein sjálvsagdan part av samskifti, marknaðarføring, branding, arbeiðsgongdum og tænastum hjá fyritøkum. Tær nýtist ikki at vera forritari, men tú hevur neyðuga innlitið til at skilja og formidla tøkniligar kravfestingar fyri eksternum veitarum, forritarum og kundum. Tú fert at hava nógv kundasamskifti og mást tí duga væl við fólki.

### UM REPROZ

Reproz er samskiftisvirki, ið veitir heildartænastu í samskifti og marknaðaføring. Á Reproz starvast 18 fólk. Vit eru ein fín blanding av ungum og eitt-lítiðsindur-minni-ungum fólkum, ið hvør á sín hátt hava evni og gávur at fremja ynskini hjá kundum okkara.

Reproz leggur stóran dent á fakligan kunnleika og starvsfólkarøkt, og vit leggja okkum nær at menna samstørv og netverk, ið geva okkum vakstrarmøguleikar, avbjóðingar, íblástur og møguleika at arbeiða uttanlands.

### UMSÓKNIR

Vilt tú gerast ein partur av okkum, og heldur tú teg hava neyðugu førleikarnar til eitt av størvunum omanfyri? Send umsókn tína við viðkomandi prógvum, CV og referansum til Reproz, Postboks 1145, FO-110 Tórshavn – ella til christian@reproz.fo. Umsóknir skulu vera okkum í hendi í **seinasta lagi 5. juli 2007**.

NEMA

Reproz er partur av NEMA, ið er størsta KT- og samskiftissamtak í Føroyum og veitir fullfíggjaðar tænastur innan KT, skrivstovuútgerð og samskifti.

REPROZ

www.reproz.fo